# VARPIÐ





Tv3 • Mánadag 4. kl. 20.00

**»Independence Day«**
Í farnu viku bórust tíðindini av amerikanska meginlandinum um, at kendi rúmdarmaðurin Edgar B. Mitchell, sum setti fótin á mánan í 1971, vildi vera við, at rúmdarverur hava verið her á jørðini. Myndugleikarnar hava so síðan dult hesar hendingar og alment víst tær frá sær. Í hesum amerikanska filminum við Will Smith á odda gera rúmdarverur um seg á jørðini. Hesar rúmdarverur kunnu – um ein vil – lýsast sum »neiligar«. Mannaættin má stríðast fyri lívinum, hin 4. juli...



Tv3 • Mikudag 6. kl. 20.00

**»Med kniven for struben«**
Tað sær út til, at parturin um Rio Bravo í Havn verður endursendur í kvøld. Bo Bech leggur merki til, at gjøgnum tey 22 árini matstovan hevur verið til, er ikki nógv nýtt hent við matstovuni ella matskránni. Kundarnir velja onnur støð, og Bo fer í hernað ímóti pulvursós- og suppum – millum annað. Tað má sigast, at sendingin í kvøld sanniliga livir upp til heitið: »Med kniven på for struben«.

Tv3 • Leygardag 2. kl. 20.00

**»Everything is Illuminated«**
Hetta er søgan um leitanin hjá einum ungum manni eftir kvinnuni, sum bjargaði abba hansara undir týsku hersetingini av Ukraina. Ferðin hjá hesum unga manninum broytist so skjótt sum hann er komin avstað. Filmurin er grundaður á heimskendan bestsellara, við sama heiti, eftir Jonathan Safran Foer. Hesin er ein av fleiri góðum filmum hesa komandi sjónvarpsvikuna.

TELEVARPIÐ

Sosialurin

**Fríggjadagur 1. august 2008**

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**